# SERSTØK BYGGISAMTYKT (B3)

# FYRI PART AV VÁGA KOMMUNU, ÚTSTYKKINGIN NORÐI Í HEIÐUM Í MIÐVÁGI.

Við heimild í §4, stk. 1. í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður ásett:

§ 1. Partur av byggiøkinum norðl í Heiðum í Miðvági verður skipað eftir serstakari byggisamtykt fyri sethús, nevnd B3.

Økið, sum henda serstaka byggisamtyktin fevnir um, er avmerkt á hjálagda kortskjali, dagfest tann 30/04-2014.

**§ 2. Fyri sethús á matriklunum 12aq, 12ar, 12au, 12av og 12az er galdandi:**

1. Hæddin lodrætt upp frá Svabosvegi, miðskeiðis um grundøkið, og upp til takskeggið, má í mesta lagi vera 2,5 m.
2. Hæddin lodrætt upp frá Svabosveg, miðskeiðis um grundøkið, og upp til mønu, má l mesta lagi vera 4,3 m.

**§ 3. Fyri sethús á matriklunum 12as, 12at, 12ax, 12ay, GR01 og GR02 er galdandi:**

1. Hæddin til mønu, má l mesta lagi vera ájavnt hæddina á Svabosvegi miðskeiðis um grundøkið.
2. Hæddin á takskegginum skal í minsta lagi verða 1,8 m lægri enn mønin.

**§ 4. Fyri sethús á matriklunum 12bf og 12be er galdandi:**

1. Hæddin, lodrætt upp frá Mikkjalsgøtu, miðskeiðis um grundøkið, og upp til takskeggið, má í mesta lagi vera 2,5 m.
2. Hæddin, lodrætt upp frá Mikklalsgøtu, miðskeiðis um grundøkið, og upp til mønu, má l mesta lagi vera 4,3 m.

**§ 5. Fyri sethús á matriklunum 12bd, 12bc, 12bb, 12aæ, GR03, GR04, GR05 og GR06 er galdandi:**

1. Hæddin, lodrætt upp frá Rasmusargøtu, miðskeiðis um grundøkið, og upp til takskeggið, má í mesta lagi vera 2,5 m.
2. Hæddin, lodrætt upp frá Rasmusargøtu, miðskeiðis um grundøkið, og upp til mønu, má l mesta lagi vera 4,3 m.

**§ 6. Fyri sethús á matriklunum 12ba og 12ao er galdandi:**

1. Hæddin til mønu, má í mesta lagi vera ájavnt hæddina á Rasmusargøtu miðskeiðis um grundøkið.
2. Hæddin á takskegginum skal í minsta lagi verða 1,8 m lægri enn mønin.

Víst verður annars til almennu byggisamtyktina galdandi fyri Miðvág.

**Kort, sum eru partur av serstøku byggisamtyktini:**

1. Kort, dagfest 30/04-2014, sum vísir, hvørjar ognir samtyktin fevnir um.
2. Kort, dagfest 12/02-09, ið vísir prinsippskurð og framsíðu.

**Samtyktar- og góðkenningarátekning.**

Soleiðis samtykt av Vága kommunustýri tann 21. mai 2014

Sandavági, hin 18. august 2014

Rósa Samuelsen, borgarstjóri

Sambært § 4, stk. 1. í løgtingslógini um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954 við seinni broytingum, góðkennir Innlendismálaráðið hetta uppskot til serstaka byggisamtykt fyri part av Miðvági.

Fiskimálaráðið ______ / ______ 2014

| FISKIMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 14/00693 |
| Ætlanarskriv: | 8/12-2014 |
| Góðkent: | 19/12-2014 |
| Váttað: | |




# Broytt serstøk byggisamtykt í Miðvági

**VÁGA KOMMUNA**

### Byggisamtykt

B3, Serstøk byggisamtykt, sethús

N

Kortið vísir broyttu serstøku byggisamtyktina.
Undirstrikaði teksturin á kortinum er matrikulnummur.

0 0,5 1 1,5 2 km

www.munin.fo 8. januar 2015 mál 2010211

Seinasta broyting

| | |
|---|---|
| Samtykt av bygdaráðnum: | |
| Framløgd alment: | |
| Endaliga samtykt: | |
| Góðkend av Fiskimálaráðnum: | |




Íbúðarlonin broytt til trý grundøkir til sethús.
Lagdir eru 4 metrar av til innkoyring til 12ay og GR01

| | | |
|---|---|---|
| sPF West-tec fo-380 Sørvág wt@wt.fo tlf. 22 50 99, 21 33 66 og 33 33 66 | | |
| Vága kommuna | Frá Mikkjalsgøtu | |
| Heildarætlan Norði á Heiðum í Miðvági | Mát: 1:1000 | Teknað: jas |
| Dagsett: Januar 2014 | Dagført: 30.04.2014 | Tekn. nr. 21.10.1 |



Prinsipp tekning. Serstøk byggisamtykt B3 norði í Heiðum í Miðvági.
Dagsett 12.02.09